# Flaggdagur 25. apríl

## SVF

18.25 DV í kvøld
18.30 Pocahontas 11:26
18.55 Gesturin e
19.25 Myndlist í Føroyum 10 e
20.00 Úr Kap til Kilimanjaro - do. ferðafrásøgn
20.30 Gekkur
21.15 Ally McBeal - amerikonsk røð
22.00 Undir haminum - svenskt krimi-drama - Óhóskandi fyri smábørn
23.35 Liðugt

## Eurosport

9.00 Weightlifting - European Championship
10.00 Golf - U.S. P.G.A. Tour Worldcom Classic
10.30 Grand Touring - Championship
11.00 Motorsports - Series
11.30 LG Super Racing Weekend
12.30 Weightlifting - European Championship
14.00 Weightlifting - European Championship - Live
15.30 Tennis - ATP Tournament - Live/Delayed
17.00 Weightlifting - European Championship - Live
17.30 Football - Gillette Dream Team
18.00 Football - Kick in Action Groups
20.00 Weightlifting - European Championship - Live
21.45 Boxing - International Contest
22.00 Football - World Cup Stories
22.15 News - Eurosportnews Report
23.15 Football - One World / One Cup
23.45 Formula 1 - Inside Formula
0.15 Football - Gillette Dream Team
0.30 News - Eurosportnews Report

## BBC Prime

0.00 TLZ: »The Lost World of El Dorado
1.00 TLZ: »Miracle In Orbit – Horizon«
2.00 TLZ: »Fighting Rust in your Car«
2.25 TLZ: »Pause«
2.30 TLZ: »Hollywood Science – Speed«
2.40 TLZ: »Mind Bites«
2.45 TLZ: »Forens – Lab Detectives - Entomology«
3.00 TLZ: »Bloodlines - a Family Legacy«
3.30 TLZ: »Sex and The Single Gene?«
4.00 TLZ: »Trouble at the Top«
4.40 TLZ: »Science In Action«
5.00 TLZ: »Make French Your Business«
5.30 English Zone
6.00 The Story Makers
6.15 Step Inside
6.25 Angelmouse
6.30 Joshua Jones: »Boomer
6.40 Playdays
7.00 Trading Places
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Bargain Hunt
9.15 Wild and Dangerous: »Bear Country
9.45 Vets in Practice: »Lovesick
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Delta & The Bannermen«
11.30 What Not to Wear
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »The Body in the Library«
13.30 Ready Steady Cook
14.15 The Story Makers
14.30 Step Inside
14.40 Angelmouse
14.45 Joshua Jones: »Boomer«
14.55 Playdays
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »The Rough and the Smooth«
16.45 Friends for Dinner: »Rick Stein«
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 What Not to Wear
19.00 Eastenders
19.30 My Hero: »Car
20.00 The Ice House
21.00 The Young Ones: »Sick«
21.35 Nurse
22.30 The Big Trip
23.00 Casualty

## BBC World

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Africa Direct (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Africa Direct (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 Asia Today
11.45 World Business Report
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 The Car's The Star (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News – followed by Weather
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report – followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 The Papal Consistory
23.00 BBC News – followed by Weather

## TV3

23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today
5.00 Garfield og venner
5.25 Børnehjørnet
7.00 TV-Shop
8.05 Hvide Løgne
8.35 Ricki Lake
9.25 Ricki Lake
10.20 Horton-sagaen
11.10 Horton-sagaen
12.00 Melrose Place
12.55 Time of Your Life
13.50 Popular
14.40 Med på moden
15.10 Pæn pige – sej sild
15.35 Ricki Lake
16.30 Simpsons
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Sjov og Spas
18.30 The Ellen Show
19.00 Skadestuen
20.00 Bag Facaden
21.05 Sex & the City
21.40 The Guardian
22.40 Seinfeld
23.10 Simpsons
23.40 Ti tommelfingre
0.10 Walker Texas Ranger
1.55 Ricki Lake
2.45 Træneren
3.15 Træneren
3.45 Ti tommelfingre
4.10 Sunset Beach

## ÚF

4.55 Godnat
7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Uni Næs, prestur lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna Fritsdóttir Mortensen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
8.50 Valagn - Reportasja frá valstríðum upp undir løgtingsvalið. Kári Durhuus og Gunnar Skúvadal leggja til rættis
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Uni Næs, prestur lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm leggur til rættis
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Tónleikur
15.00 Flaggdagshald í Havn
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Valagn (e) - Reportasja frá valstríðum upp undir løgtingsvalið. Kári Durhuus og Gunnar Skúvadal leggja til rættis
17.15 Barnaløtan (e) - Jonna Fritsdóttir Mortensen og Kári Sólstein leggja til rættis
17.30 Framløgusending hjá Sambandsflokkinum
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Í andgletti - Eitt umboð fyri Sambandsflokkin svarar spurningum frá Bjørt Samuelsen og Helga Jacobsen
19.25 Valtingið - Umboð fyri Sambandsflokkin svara spurningum frá teimum 30, sum manna Valtingið í Útvarpshøllini
20.00 Tilvera - Armgarð Arge leggur til rættis
20.30 Framhaldssøga
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Rás

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Tingrásin (e) - Endursending frá í gjár - Fólkaflokkurin hevur framløgu - Sonne Smith er vertur
11.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jeremias profetur (3:12) - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Endursending frá kl. 12.00 í dag non stop til kl. 06.00

## Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti
2.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast

## Gekkurin




verður fluttur til Flaggdagin orsakað av Dýra biðidegi.

## Undir haminum

SVF Hóskvøldið kl. 22.00

(Under ytan) – Svenskt krimidrama frá 1997.

23 ára gamla Sandra verður drigin inn í narkoumhvørvið í Stokkhólmi av narkoseljaranum og alfonsinum Roffe, og hon er púra niðurundirkomin, tá ið hon sær, at hon kemur ikki undan, um hon ikki sleppur sær burtur úr umhvørvinum og frá Roffe. Men tá Sandra, langt burturi frá Stokkhólmi, fættir, at Roffe er farin eftir 18 ára gomlu lítlusystrini, noyðist hon at venda aftur til umhvørvið, sum nærum fekk lívið av henni.

Leikarar: Johanna Sællstrøm, Tove Appelquist, Mikael Persbrandt, Elisabeth von Gerber og fleiri.

Leikrit: Daniel Fridell og Jimmy Karlsson.

Leikstjórn: Daniel Fridell.

Filmurin er óhóskandi fyri smábørn.

## Sex and the city

TV3 Hóskvøldið kl. 21.05

Carrie hittir ein nýggjan mann, Wade Adams og einum »skæg og spøg«-handli. Hon verður beinanvegin forelskað í hansara íbúð, men ikki í mammu hansara... Charlotte leitar eftir eini loysn til seksuella trupulleikan hjá Trey á internetinum, og ger av, at tey skulu fara til ein sex-terapeut. Miranda hevur fingið boyla, og hetta ger, at hon kennir seg sum ein tannáring…

## ÚF Morgunlestrar

**22.–25. og 27. apríl**

***Uni Næs, prestur, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 22. apríl:**
nr. 374 Um synd og skomm teg hava sprongt
2. Kor. 12,9
nr. 276 Miskunna mær, Guð

**Týsdagin 23. apríl:**
nr. 518 Teg vil eg elska, tú mín styrki
1. Jóhs 4,7–9
nr. 163 Tá Kristus, vár Guð

**Mikudagin 24. apríl:**
nr. 482 Guð, kærleiks faðir, ver hjá mær
Sálm. 139,7–9
nr. 369 Gakk tú fram við góðum treyst

**Hósdagin 25. apríl:**
nr. 588 Boðar tú til allar tjóðir
Luk. 9,23
nr. 585 Tú alfagra land mítt

**Leygardagin 27. apríl:**
nr. 411 Bønin er mín himmalstigi
Matt. 6,6
nr. 406 Bið, o, Jesus, fyri mær



## VALGREINAR

# Ríkidømið í sjóøki okkara er ríkidømi føroyinga

**William Max Hansen**
*Valevni Javnaðarfloksins Eysturoy*



Okkara ríkidømi í havinum er soleiðis háttað, at tað alla tíðina endurnýggjar seg sjálvt. Tí er so umráðandi, at vit fara væl um hetta ríkidømið við skynsamari gagnnýslu og skilagóðari stovnsrøkt.

Tað er altavgerandi, at vit varðveita tann førleika, sum ígjøgnum fleiri ættarlið er bygdur upp í fiskivinnuni. Ein førleiki, sum ikki má fara fyri skeyti av kappingini við eina møguliga oljuvinnu. Í staðin skal partur av tí, sum nýggja vinnan kastar av sær, viðvirka til eina munandi menning av øllum tættum í okkara fiskivinnu. Eini menning, sum er grundað á vistfrøðiliga burðardygd. Við granskingar- og menningarverkætlanum skal tryggjast, at føroysk fiskivinna alsamt megnar at lúka tey krøv, sum framtíðar brúkarin fer at seta.

Tí skulu landsins myndugleikar hava eitt vakið eyga við, hvussu fiskivinnan er fyri í kappingini við eina møguliga oljuvinnu. Vit skulu vera til reiðar at taka neyðug stig, soleiðis at vit kunnu lata eina vælskipaða og burðardygga fiskivinnu á høgum førleika- og tøkniligum menningarstigi til okkara eftirkomarar.

Á Føroyaleiðini skal fiskidagaskipananin standa sína roynd. Henda skipan kann brúkast til at tryggja eina skynsama gagnnýtslu av fiskastovninum, og hon hevur við sær, at allur fiskur verður førdur til lands. Javnaðarflokkurin tekur hinvegin ikki undir við fullari umsetiligheit í fiskivinnuni. Ein tílík skipan hevur einans til endamáls at broyta eigaraviðurskifti í flotanum, soleiðis at hesi vera miðsavnað á færri og færri hendur. Harumframt vil samansetingin av flotanum sum frálíður broytast til at tæna áhugamálunum hjá hesum alt fækkandi eigarum við tí fylgju, at útróðrarflotin í longdini verður keyptur upp av teimum stórru og kapitalsterku eindunum, og avleiðingin verður, at hetta økir flytingina frá útjaðaranum til miðstaðarøkið.

### Fiskivinnupolitikkur

Mál er at reka ein fiskivinnupolitikk, sum tryggjar, at veiðan verður umsitin á ein hátt, sum gevur mest møguligan samfelagsvinning. Sum tryggjar fiskimonnum eina góða úrtøku og góð arbeiðskor. Sum tryggjar skilagóða stovnsrøkt við gýtingar- og økisfriðingum og tekniskum reguleringum. Sum miðar ímóti, at í samstarvi við vinnuna skal landið fremja gransking og royndarvirksemi á sjógvi og landi við tí fyri eyga at gera grundstøðið undir fiskivinnuni so gott sum gjørligt.

Rættindi til fiskikvotur skulu vera á føroyskum hondum. Javnaðarflokkurin fer støðugt at stríðast ímóti, at veiði- og fiskiloyvi verða søluvøra hjá einstaklingum.

Smáu útróðrarbatarnir skulu hava frítt at fiska. Javnaðarflokkurin fer saman við vinnuni at leggja ætlanir fyri eina miðvísa endurnýggjan av fiskiflotanum, soleiðis at vit við einum fjølbroytum flota gagnnýta havið á nær- og fjarðleiðum. Búskaparliga økið føroyinga er høvuðsálitið. Dentur verður lagdur á við samráðingum at varðveita og víðka teir møguleikar, vit hava hjá øðrum, umframt at skapa nýggjar. Neyðugt kanningararbeiði av nýggjum leiðum og óroyndum fiskastovnum skal fremjast - um neyðugt í samvinnu við aðrar.

### Fiskaaling

Málið við alipolitikkinum er, at alivinnan skal gerast ein enn meira týðandi táttur í samfelagsbúskapinum. Neyðugt er við neyvum eftirliti av vinnuni. Aliloyvi eiga bert at verða givin, har umstøður eru at ala. Alingin skal verða undir føroyskum eftirliti. Neyðugt er at útbyggja fiskadjóralæknatænastuna og at skipa fyri útbúgving av fólki í alivinnuni. Gjørdar verða framhaldandi royndir eisini við aling av øðrum fiskasløgum.

# Tjóðveldisflokkurin pyntar seg við læntum fjarðum

**Zacharias Bech**
*Valevni sambandsfloksins í Suðuroy*

Við yvirskriftini "Hvussu forða vit hinum flokkunum at tøma landskassan" heldur tjóðveldisflokkurin fundir, í eini roynd at vinna sær atkvøður til løgtingsvalið.

Ein heldur ódámlig, og eftir míni metan, ein ósømulig orðing at brúka um øll tey, og tey eru mong, sum ikki eru av somu meining sum tey ið velja tjóðveldisflokkin.

At flokkurin orðar seg soleiðis er væl tí, at teir í hesum valskeiði hava sitið við ábyrgd fyri fíggjarmálum, og hava í hesum tíðarskeiði økt um innistandandi í landsbankanum við 1,5 mia. kr.

Í hesum valskeiði eru umleið 3,8 mia. kr. komnar inn til Føroyar sum blokkstuðul úr danska statskassanum. Tær 1,5 mia. kr. sum settar eru inn í landsbankan í sama tíðarskeiði, gevur 375 mió. kr. í meðal um ári, og er hetta tað, sum eftir er, tá landskassin hevur goldið allar sínar útreiðslur. T.v.s. at vit hava brúkt útvið 600 mió.kr. árliga av blokkstuðlunum til at reka tað førooyska samfelagið fyri.

Tá sagt hevur verið, at yvurskoti hevur verið millum 600 og 700 mió. kr. árliga, so er hetta beinleiðis ósatt tí her hava tær 323 mió. kr., sum landskassin rindar árliga í rentu og avdrag av lánum úr danska statskassanum ikki verið roknaðar uppí tá talan hevur verið um útreiðslur úr landskassanum.

Um tað hevði verið so, at sitandi landstýri hevði minka um blokkin tað fyrsta árið teir sótu, hvat hevði verið mest natúrligt, tá hugsa verður um vanvirðandi umtalu sami blokkstuðul hevur havt, so hevði ikki ein króna verið til avlops hjá verandi fíggjarmálaráharra, at sett í landsbankan.

Tá vit so vita, at tað er sambandsflokkurin, sum við sínum politikki hevur hildið og framvegis fer at halda fast við ríkisfelagsskapin, sum hevur gjørt, at nevndi blokkstuðul kemur til Føroyar, kann av sonnum sigast at tjóðveldisflokkurin pyntar seg við læntum fjarðum.

Um vælferð okkara gjøgnum ríkisfelagsskapin framvegis skal vera tryggja hevur sambandsflokkurin brúk fyri tínari atkvøðu til løgtingsvali.

Við sambandsflokkinum trygt inn í framtíðina.

# Neyðhjálp

**Gunnar K. Nattestad**
*Valevni Sambandsfloksins í Vágum*



Tíðin er komin at seta eina sømiliga upphædd til neyðhjálp á fíggjarlógina.

Sum einstaklingar geva føroyingar nógv og gera eitt stórt hjálpararbeiðið víða um heimin, men á fíggjarlógini stendur illa til. Mín vón er at almennu Føroyar vilja geva teimum ið líða neyð, eina hjálpandi hond; eisini vid at geva pengar. Okkara mál má verða at vit koma uppá 0,5% av BTÚ í komandi valskeiði.

Um vit fáa inntøkur frá olju, eiga vit eisini at hava hjartað til at vælsigna onnur gjøgnum tað vit hava fingið. Hetta kundi hóskandi verið gjørt vid at ávísur partur av avkastinum frá einum møguligum oljugrunni, verður latin til hjálpararbeidi.

Lat okkum vera eina tjóð, sum torir at lata av okkara ríkidømi til onnur, ið á so mangan hátt eru verri fyri enn vit. Gleðin og vælsignilsi av at geva, skuldi í sjálvum sær veri nokk til at gongd kom á hettar málið.

# Sambandsflokkurin og vinnulívið

**Edva Jacobsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Sambandsflokkurin ynskir at skapa tær bestu fortreytirnar fyri vinnulívinum í landinum. Teir bestu karmarnir skulu setast upp, soleiðis at vinnan kann menna seg á besta hátt.

Tað almenna skal ikki reka vinnulív, tí tað eru teir privatu bestir til, um teir fáa loyvi til tess. Landið skal ikki leggja meinbogar í vegin fyri vinnulívinum við avgjøldum og øðrum hindringum, men skal stuðla upp undir.

Spurningurin er so, hvussu skal tað almenna stuðla vinnulívinum? Tað er ein almenn skylda at skipa fyri, at havnaløgini eru so atkomulig sum gjørligt, at vegakervið er heilt útbygt, so vinnan kann virka uttan ampa fyri hesum millum bygdir og oyggjar, soleiðis at flutningskostnaðurin verður so lítil sum møguligt.

Eisini er tað ein skylda, at tað almenna veitir eina so góða skúlaskipan sum gjørligt, fyri at vinnulívsfólkini og starvsfólk teirra hava eina so góða útbúgving sum yvirhøvur møguligt.

Vit kunnu ongantíð ov ofta siga tað, at vinnan skal ikki hava studning, tí hetta er kappingaravlagandi. Sambandsflokkurin hevur verið við til at fáa studningin burtur, og vit ynskja, at tað skulu verða brandmúrar millum landskassan og privatlívið/vinnulívið. Allar royndir við einari samanblanding eru miseydnaðar, og tí skulu vit forða fyri hesum.

Sambandsflokkurin vil eisini virka fyri, at tað ikki eru bert tey fáu, sum kunnu virka og eiga vinnulívið, men at vit í framtíðini skulu fáa fleiri vinnulívsfólk, sum fáa loyvi at reka vinnuvirksemi, uttan tað almenna blandar seg.

# Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*